# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eitt valdømi – setir stór krøv til flokkarnar

Løgtingsformaður váttar fyri Sosialinum í dag, at meiriluti er í formanskapi løgtingsins fyri, at umsitingin hjá løgtinginum skal fyrireika eitt uppskot um at gera Føroyar til eitt valdømi.

Mikið kjak er javnan um hetta mál, og eingin flokkur og eingin samgonga megnar at finna eina semju. Heldur ikki formansskapurin í løgtinginum, men við tað, at tveir av teimum fýra limunum í formansskapinum eru ímóti, meðan hinir báðir, har formaðurin er sjálvurannar eru fyri, telur atkvøða formansins meira, og tí er meiriluti í formansskapinum fyri hesum.

Vit skulu ikki á hesum stað gera okkum til talsfólk fyri, hvat er tann mest demokratiskt rætta valskipanin. Men vit halda tó, at tíðin er farin frá skipanini við teimum sjey valdømunum.

Við støðugt útbygda samferðslukervinum er samfelagið broytt sera nógv, eins og kommunusamleggingar eisini eru farnar fram yvir valdømismørk.

Tí er tað helst rætt at broyta skipanina – og hví so ikki gera alt landið til eitt valdømi? Tá fáa allir borgarar høvi at velja tað valevni, teimum líkar best. Norðoyingar kunnu t. d. velja Jóannes Eidesgaard, meðan suðuroyingar kunnu velja Anfinn Kallsberg.

Hinvegin setir hetta sera stór krøv til politisku flokkarnar. Sum organisationir virka flokkarnir ikki væl. Hóast munandi ábøtur eru gjørdar seinastu árini, har flokkarnir fáa almennar pengar til rakstur, so kunnu vit enn ikki siga, at nakað av floksapparatunum virka til fulnar.

Um so var, at flokkarnir og valfeløgini virkaðu væl, so hevði eisini borið til at broytt uppstillingina soleiðis, at flokkarnir høvdu størri ávirkan á, hvør varð valdur. Í grannalondum er tað flokkurin og valfelagið, sum stillar valevni upp í nummarrøð, og so verður tað fyrst nummar eitt, sum verður valdur. Fær flokkurin tvey umboð í valdøminum, so kemur nummar tvey á listanum eisini inn o. s. fr. Henda skipan verður t. d. brúkt í Íslandi, men eisini í USA, har flokslimir hjá Demokratunum og Republikanarunum um skamma stund skulu kjósa sær forsetavalevni.

Tað er hugaligt, at tað tykist at verða meiriluti á tingi fyri at broyta valskipanina. Men okkara kosnu menn og kvinnur áttu í sama viðfangi at styrkt og ment politisku floksorganisatiónirnar.

**Sosialurin**

## Milliardir eru ikki smápengar

**HELGI ABRAHAMSEN**



Arni Abrahamsen, fyrrverandi formaður í "Ungum fyri Miðflokkin", hevði eina grein í bløðunum í farnu viku, sum var eitt aftursvar til tað, sum eg havi sagt um blokkstuðulin.

Arni endurtekur í greinini tað sum Miðflokkurin segði í eini blaðlýsing tann 11. mai um týdningin av blokkstuðlinum. Hann sigur, at niðurskurðurin í blokkstuðlinum hevur kostað 2 milliardir krónur higartil, og at hetta at síggja til eru nógvir pengar, men sæð í "eini størri heild" er hetta kortini ikki so. Tíverri greiðir hann ikki nærri frá, hvat hann meinar við hesum, og tað er spell, tí eg kundi ógvuliga fegin hugsað mær at fingið at vita, hvat hetta er fyri ein "heild" sum ger 2 mia. krónur til smápengar. Kanska kann hann í eini seinni grein greiða nærri frá tí.

Arni ávarar ímóti at fáa ov nógvar pengar inn í samfelagið, tí tað hevði sett enn meira ferð á búskapin, og kostnaðarstøðið hevði hækkað. Tí vil hann hava blokkstuðulin burtur. "*Hvussu hevði støðan verið, um ein peningastreymur á tils. 2 mia. kr. eyka, hevði runnið inn í samfelagið seinastu árini? Og hvat skuldu pengarnir verið nýttir til*"? spyr hann.

Eg trúði ikki, at tað kundi vera nakar trupuleiki at finna útav, hvat pengarnir skuldu verið brúktir til, men er onkur kortini í iva, so kann eg, sum dømi, nevna hesar møguleikarnar:

1. Landskassin skyldar framvegis yvir 2 mia. krónur. Um pengarnir vórðu brúktir til at niðurgjalda skuld við, so hevði tað ikki hitað búskapin.
2. Pengarnir kundu verið spardir upp til at brúka í verri tíðum. Hetta hevði heldur ikki hitað búskapin fyrr enn seinni, tá búskapurin aftur treingir til "ein fløva".

**Konjunkturjavning**
Føroyski búskapurin er sera skiftandi. Onkuntíð streyma pengarnir inn í samfelagið, og næstu løtuna er kreppa (ella okkurt sum líkist tí). Tí er tað umráðandi, at tað almenna leggur pengar til síðis í góðum tíðum, soleiðis at vit ikki standa við ongum, tá tíðirnar aftur gerast verri.

Men hvussu gongur við uppsparinigini, nú loysingarflokkarnir hava tveitt meira enn 2 mia. burtur?

Taka vit til dømis árið 2001 (sum var seinasta árið áðrenn blokkstuðulin lækkaði), so var eisini nógv fer á búskapinum tá. Landskassin hevði næstan 700 mió. krónur í avlopi, og blokkstuðulin hetta árið var 995 mió. krónur. (Legg til merkis, at avlopið eisini tá var nógv minni enn blokkstuðulin). Tá bar til at leggja pengar til síðis.

Nú er aftur nógv ferð á búskapinum. Men landskassaavlopið síðani blokkstuðulin varð skorðin niður hevur einki ár verið í námd av teimum 700 mió. krónunum. Tað sum vit spara upp nú, er fyri stóran part inntøkur, sum koma frá sølu av almennum ognum, - men sum øll helst duga at skilja, so kunnu vit ikki selja Føroya Banka fleiri ferðir.

Vit merkja kanska ikki so nógv til hetta nú, men tá kókið aftur er farið av búskapinum, og vit skulu í bankan eftir pengunum, sum eru lagdir til síðis í teimum góðu tíðunum, tá verður ov lítið at taka av.

**Nýggjar inntøkur**
Arni sigur, at stuðul er ósunnur, og at vit skulu liva av tí sum vit sjálvi klára at framleiða. Tað er ein útsøgn, sum eisini var nógv at hoyra undir fullveldislandsstýrinum, men hvørjar nýggjar inntøkur blivu skaptar tá? Nógv hevur verið tosað, men lítið sæst aftur.

Hugskot hava verið frammi um at gera lidnar fiskavørur, um surimiframleiðslu, gransking, ferðavinnu, oljuvinnu o.s.fr. Einaferð skuldi dregging eftir igulkerum eisini vera eitt slag av "tjóðarinnar bjarging", men alt hetta sær út til at vera nógv lættari sagt enn gjørt. (Tað seinasta nýggja er, at serfrøðingar siga, at vit mugu gevast við at fiska tosk við Føroyar – tað kann gerast eitt stórt stig tann skeiva vegin).

Sjálvsagt skulu vit royna at ganga nýggjar leiðir, men vit mugu ikki halda, at um vit kuta blokkstuðulin burtur, so kemur alt hitt uppá pláss av sær sjálvum. Tað ger tað ikki!

**Vandi fyri øktari nýtslu**
Arni Abrahamsen vísir á, at tá vit hava nógva inntøku, so økist eisini vandin fyri øktari nýtslu. Tað er ikki óhugsandi. Men politiska loysnin á hesum kann ikki vera, at vit skulu satsa uppá at hava undirskot, fyri at sleppa undan freistingini eftir at brúka av yvirskotinum.

Annars hava føroyingar fyrr víst í verki, at vit sakt-ans klára at brúka meira pengar, eisini tá inntøkan minkar. Frá 2001 til 2002, tá blokkstuðulin minkaði við 366 mió. krónum, øktust rakstrarútreiðslurnar hjá landskassanum við 300 mió. krónum og íløgurnar við 60 mió., so teori og praksis ganga ikki altíð hond í hond.

**Spurningur til Arna**
Eg fari til seinast at seta Arna Abrahamsen ein einfaldan spurning: Um allur stuðul er ósunnur fyri búskapin, og ein milliarda innspræning í samfelagið er oyðiléggjandi, vil tú so harvið siga, at vit eiga at steðga allari oljuleiting við Føroyar? – Eg meini so við – um føroyski búskapurin ikki tolir at fáa 2 mia. úr Keypmannahavn, so tolir hann væl heldur ikki at fáa uppaftur fleiri milliardir úr London, ella onkra aðrastaðni frá???

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.